Dimmalætting

Leygardagur

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Nr. 27 • 120. árgangur • 8. februar 1997 • Tlf. 11212 • Fax 10941

7 kr.

»Okkara Gulu«

»Viðskerin«

Jóan Karl Høgnesen finst hvassliga at metingarnevndini

Fráfarni stjórin á Vaktar- & Bjargingartænastuni heldur lítið um tað metingararbeiði, sum sokallaða metingarnevndin hevur gjørt í sambandi við gølumálið um Nólsoyar Páll.

NICLAS JOHANNESEN

Tað er næstan bert á einum øki, at fráfarni stjórin á V&B Jóan Karl Høgnesen er samdur við tilmælinum frá metingarnevndini: Nólsoyar Páll eigur at verða umvældur liðugur.

Annars heldur Jóan Karl lítið um metingarnar hjá nevndini. Fráfarni stjórin sær onki høpi í, at 25 milliónir krónur skulu brúkast í sambandi við Nólsoyar Páll.

»Men talið 25 mill. kr. er umleið 9 mill. kr. ov høgt, í mun til tað skipaprojekt, sum byrjað var uppá fyri einum ári síðan. Her hevur nevndin gjørt meting av heilt øðrum slag«, skrivar Jóan Karl Høgnesen í viðmerking inni í blaðnum í dag.

Hann vísir á, at nevndin koyrir á skeivum spori, tá hon sigur, at tað fer at kosta 10 milliónir krónur at fáa skipið á sama støði sum Tjaldrið.

»Hvat er tað fyri nakað«, spyr Jóan Karl. »Nólsoyar Páll hevur ongantíð skula sammetast við Tjaldrið«, leggur hann aftrat.

Jóan Karl Høgnesen heldur eisini, tað er løgin framferðarháttur, at kanningarnevndin hevur verið umborð saman við manning og skipasýni og kannað skipið. Fyrrverandi stjórin á V&B hevur rúgvu av øðrum punktum hjá metingarnevndini, sum hann setir spurnartekin við.

»Eg veit ikki, hví henda metingin skuldi gerast, tað var ikki neyðugt og hevur bert gjørt málið enn meira fløkt, enn tað var gjørt til. Hevði arbeiðið ikki verið steðgað, men hildið fram, høvdu vit havt eitt gott vaktarskip siglandi í desember mánaði«, er niðurstøðan hjá Jóan Karl Høgnesen.

Mynd: Kalmar Lindenskov

Smílandi grýlur bera mentunnararvin víðari

Mánadagin er føstulávintsmánadagur. Friggjadagin høvdu tær fyrstu grýlurnar longu riggað til. Í dag er grýlan ikki so stór. Talan er fyrst og fremst um børn, sum banka á dyrnar hjá fólki, og kanska fáa ein kakubita ella eitt oyra í sjáttuna — sjálvt um gamalt var ikki at geva pengar, men sína gestablídni á annan meira persónligan hátt.

Føstulávint er tradition, ið ikki hevur sama stóra týdning í dag, sum áður. Men kortini livir traditiónin. Á føstulávint endar dansitíðin. Og í føstuni er síður at ganga grýla. Fyrr vóru tey mong vaksin, ið eisini gingu grýlu, nú er hetta meira sjáldsamt.

Okkara mæti høvundi William Heinesen hevur lýst grýluna í eini stuttsøgu, og tað sigst, at støðið undir frásøgu hansara er munnborin frásøgn úr Norðoyggjum.

nic

Roknskaparligt óskil á Telefonverkinum

Stórt óskil hevur verið við roknskapinum hjá telefonverkinum seinnu árini.

Eingin roknskapur er endaliga góðkendur síðan 1992.

Telefonverkið hevur ligið í stríð við Toll- og Skattstovuna um útistandandi MVG fyri fleiri ár.

Talan er um yvir 10 milliónir krónur.

Andrass Róin, stjóri á Telefonverkinum, sigur, at tá hann gjørdist stjóri, vildi hann ikki undirskrivað roknskapirnar, fyrr enn viðurskiftini vóru komin upp á pláss, tí hetta viðvíkti einum tíðarskeiði, áðrenn hann gjørdist stjóri.

Heimatíðindi, síða 3

Hald lagt á 200 kilo av kokaini

(REUTER) Italska løgreglan boðaði friggjadagin frá, at hon hevði lagt hald á 200 kilo av kokaini og handtikið sjey italiumenn.

Løgreglan í Firenze segði, at kokainið var komið til Italia í einum skipi, har tað var goymt í eskjum við turkaðum blómum.

Italska løgreglan hevur í fýra mánaðir arbeitt við at fáa fatur á kokainsmuglarunum, og hon hevur hetta tíðarskeiðið samstarvað við løgreglurnar úr USA og Colombia.



Oljulógin fæst - men ikki her

Hóast tað ikki ber til at fáa hendur á fyribils oljulóggávuni í Føroyum, so hava føroyingar fingið hendur á einum útkasti uttanlands.

DIA MIDJORÐ

Ført verður fram at størsta avbjóðingin nakrantíð hjá føroyingum liggur í oljuvinnuni. Tískil er tað heldur ikki so løgið, at fleiri føroyingar royna at fáa innlit í lóggávuna, sum kemur at verða karmurin um hesa vinnu.

Tað er Oljuráðleggingarnevndin, ið smíðar lóggávuna og hevur higartil gjørt nøkur uppskot. Tað ber kortini ikki til at fáa hendur á fyribils lóggávuni her heima, men Dimmalætting hevur verið í samband við føroyingar, ið hava fingið útkast til lóggávuna uttanlands.

Herálvur Joensen á Oljufyrisitingini sigur í hesum sambandi, at teir ikki vilja lata fyribils lóggávuna út til føroyingar, tí talan er um eitt fyrireikandi lógararbeiði, sum tískil kann broytast nógv.

– Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá fleiri pørtum uttanlands – partvís oljufeløgum og myndugleikum. Tað, sum er hent, er, at onkur av hesum hevur sent uppskotið aftur hendaveg, fyri at fáa viðmerkingar frá sínum kontaktfólkum í Føroyum. Tískil er uppskotið komið út, umvegis okkum, sigur Herálvur Joensen.

Hann sigur víðari, at ætlanin er ikki at senda uppskotið til hoyringar hjá føroyskum myndugleikum enn, tí tað skal vera eitt sindur meira ítøkiligt, áðrenn tað kemur út.

Ætlandi verður oljulóggávan liðug einaferð í apríl/mai-mánaði.

Oljuvinnan stendur fyri durum, og fyrireikandi arbeiði til lóggávu fer fram – men eingin fær innlit í arbeiðið

Í BLAÐNUM Í DAG



S&K vil hava stóru arbeiðsplássini við

– Vit hugsa, at tað verður lættari at skapa respekt, tá vit fara at arbeiða saman við Føroya Arbeiðarafelag, sigur 29 ára gamli formaðurin í S&K, Ronny í Lon.

Heimatíðindi, síða 3

Skála Kommuna fegnast um skipasmiðjukeypið

Símin Pauli Berg, bygdarráðsformaður í Skála Kommunu, er fegin um, at ein keypari var til Skipasmiðjuna Føroyar. – Tað hevur ikki so stóran týdning, um tað eru føroyingar ella útlendingar, sum eiga skipasmiðjuna, bert arbeiði er á henni, sigur hann.

Heimatíðindi, síða 3

VHF'urin skal hoyrast á innaru landleiðini

Miðflokkurin hevur lagt uppskot til samtyktar fyri løgtingið í sambandi við VHF-sendinetið. Útbyggjast skal, so VHF'urin hoyrist allastaðni á innaru landleiðunum

Heimatíðindi, síða 3

Regin Guttesen komin heim úr Nashville

Regin Guttesen er nú komin heim til Føroya við egnum tilfari, sum nakrir av fremstu tónleikarunum í Nashville hava spælt. Nú skal síðsta hond leggjast á komandi fløguna í Føroyum.

Heimatíðindi, síða 4

Hertz bilútleigan

SØLUTILBOÐ:
1 Toyota Carina XLi
11.000 km, frá jan. '96.
Prísur: 125.500 kr.
Umbýti møguligt.
Góð fígging.

J. Broncksgøta 23
Tlf. 87583
Tlf. 12107

TÍMAMYNDIR
Tlf. 10515
ÚTSØLA
50% Allar rammur
25% Kikarar - album taskur
15% Fototól